# Betraðust við tíðini



*Plássið á høgra bakkið er kanska størsta ivamálið á landsliðnum, nú Pól Thorsteinsson er leikbannaður. Hesa ferð fekk Christian Høgni Jacobsen møguleikan, men spurningurn um plássið tykist framvegis eins opin, og hann var undan dystinum*

**Størsta lopið í mun til sunnudagin mundi Súni Olsen fremja, men felags fyri størsta partin av liðnum var tó, at heildaravrikið batnaði, sum dysturi leið**

LEIKARAUMMÆLI
*Jákup Mørk*

**1. Jens Martin Knudsen, NSÍ, 58 dystir/0 mál**
Fekk eisini seinna dystin millum stólparnar, tá Jákup Mikkelsen meiddi sær fingurin undir venjing, og veteranurin prógvaði, at tað framvegis er hørð kapping um málverjasessin. Var maðurin, sum framdi brotssparkið, men var tá fullkomuliga seldur av sínum egnum, og í aðrar mátar var hann mest sum ímyndin av tryggleikanum. Tók sær væl av øllum tí, sum varð sent oman móti honum, og var móti dystarenda bjargingarmaðurin, tá hann stórbjargaði roynd frá leysum mótstøðumanni.

**2. Christian Høgni Jacobsen, Vejle, 15/2**
Var hesa ferð á óvanda leiklutinum sum høgri bakkur, og tað var eyðsæð, at hetta ikki hóvaði honum serliga væl. Hóast hann fleiri ferðir kom væl niðan við, so toktist vera trupulleikar í samspælinum við miðvøllin, tó at hetta betraðist, sum dysturin leið. At plássið er óvant kom eisini til sjóndar, tá hann einar tríggjar ferðir sendi inn í vøllin, til trýstar mótstøðumenn, heldur enn at rudda niðaneftir. Alternativini á plássinum eru kanska fá til komandi dystin, men valið av Christian Høgna tykist kanska ikki heilt so upplagt, sum hjá fleiri øðrum.

**3. Hans Fróði Hansen, B68, 25/1**
Hevði rundan dag á landsliðnum, men fyri tað varð talan ongan tíð um ein dyst oman fyri tað vanliga fyri hansara viðkomandi. Tóktist tungur, tá upprunin til brotssparkið kom, men tað var hann nú ikki einsamallur um. Á pluss-síðuni telir tó, at hann ikki hevði heilt so stórar plaseringstrupulleikar, sum í fyrra dystinum, men væntandi kvikleikin er ein trupulleiki, tá spælt verður við flatari verju. Er tó uttan iva at síggja á liðnum komandi dystin, tí hóast manglar, so hevur hann eisini dygdir, sum fáir landsmenn gera honum eftir.

**4. Súni Olsen, GÍ, 8/0**
Fekk ein møguleika afturat á vinstra bakki, og hesa ferð tók hann av. Tóktist í allar mátar hava munandi betri sjálvsálit í spælinum. Royndi í nógv størri mun at spæla bóltin, heldur enn at sparka, og var eisini við í nógvum frameftir vøllinum. Var maðurin aftan fyri bæði uppleggini, og kundi við eitt sindur av hepni eisini sjálvur komið á talvuna, men eftir at hava skorið væl inn í vøllin fór langskot hansara langt við síðuna av.

**5. Jón Rói Jacobsen, Brøndby, 7/0**
Hóast hann telist millum teir minst royndu á landsliðnum, so sæst hetta ikki aftur í spælinum. Við kvikleika sínum var hann fleiri ferðir tryggi seinasti skansin, tá tunga føroyska liðið varð yvirspælt fyri steðgin, men í uppspælinum tók hann ikki lut í so nógvum, sum hann vanliga ger. Hevði ein lítlan snudd at dragast við, og tí var útskiftingin náttúrlig, men at hann er trygt fyrsta val á plássinum í drúgva tíð framyvir, man eingin sum helst ivi vera um.

**6. Rógvi Jacobsen, HB, 19/1**
Skuldi sannføra venjaran um, at tað er hann, sum skal hava vinstra miðvallarsessin, og fekk tí allar 90 minuttirnar hesaferð. Sýndi í løtum, at hann væl kann vera rætti maðurin her. Bæði í verju- og álopsstøðum vóru góðar taktir at hóma, men í løtum tóktist tó at bila við konsentratiónini. Nakað sum kanska ikki er óvanligt, eftir bæði at hava spælt og flogið so stutt undan dystinum. Skal helst stríðast við Heðin av Lakjuni um sessi komandi mánaðin, og í fyrsta umfari hevur Rógvi kanska vunnið sær ein lítlan fyrimun her.

**7. Fróði Benjaminsen, B68, 20/1**
Var saman við Julian Johnsson partur av vanligu miðvallarsamansetingini, men tað var heldur misjavnt, hvussu hetta royndist. Hevði ilt við at fáa fatur á mótstøðuni fyrsta partin av dystinum, men kom tó betri við, sum fráleið. Sýndi enn einaferð, at hann ikki bakkar fyri nøkrum góðum nærdystum, og hóast hetta ikki var millum mest sannførandi avrik hansara, so er einki at ivast í, at hann framvegis er tryggur á plássinum.

**8. Julian Johnsson, B36, 49/3**
Var føroyski matchvinnarin í dystinum, tá hann stútaði hornasparkið frá Súna í kassan, men var annars sera svingandi í avrikinum. Byrjaði sum restin av liðnum rættiliga illa, men arbeiddi seg sum vant væl upp. Varð í seinna hálvleiki nýttur í høgra borði, og her prógvaði hann, at hann væl kann vera eitt gott alternativ, um hetta gerst neyðugt. Fyrst og fremst tí orkan er til at tuska síðuna upp og niður allan dystin, men sýndi til tíðir eisini betraðar taktir í avspælinum.

**9. Jákup á Borg, B36, 26/1**
Vanliga lættbeinti leikarin tóktist óvanliga tungur hendan dagin, og tá kasakar so eisini høvdu lært at ansa serliga væl eftir hansara síðu, var ikki stórvegis, sum hann fekk burturúr hendan dagin. Eftir drúgva skaðasteðgin og nú tveir dystir innan tríggjar dagar var kanska heldur ikki ónáttúrligt, at hann ikki var í hægsta gear hendan dagin, og útskiftingin fall tí náttúrliga. Men lítil ivi er tó um, at hann framvegis er fastur á plássinum.

**10. John Petersen, B36, 45/6**
Sýndi enn einaferð, at hann er ein leikari, sum liðið illa fær verið fyriuttan. Kanska ikki altíð so sjónligur, men hann megnar fram um flestu aðrar at vera sambindingarlið í spælinum, og er altíð maður fyri at gera tað óvæntaða, sum kann skræða mótstøðuverjuna upp. Slapp tó ikki á talvuna hesaferð, men tað man gera minni í so máta.

**11. Andrew av Fløtum, HB, 8/1**
Eftir fráveru í fyrra dystinum fekk hann hesaferð møguleika millum teir fyrstu ellivu. Tóktist vera hampuliga væl upplagdur, og var millum teir mest sjónligu føroysku leikararnar fyrstu dølsku løtuna. Hevði tó ikki eydnuna við sær fyri steðgin, tá málverjin fyrst stórbjargaði stútara, og seinni tá hann misnýtti risamøguleika. Bøtti tó um hetta við sínum fyrsta landsliðsmáli eftir steðgin, og tó at hann varð skiftur út, munnu greiðar ábendingar vera um, at hann eisini komandi dystin er fremsta val til plássið.



**12. Hjalgrím Elttør, KÍ, 6/0**
Fekk seinasta korterið á vøllinum, og kann tí ikki so væl metast. Men var tó upprunin til tað, sum kundi endað við vakrasta landsliðsmálinum í søguni.

**13. Óli Johannesen, Hvidovre, 60/1**
Við leikbanni til komandi dystin byrjaði Óli uttanfyri, men hann fekk seinastu trý korterini í miðverjuni, og fekk harvið aftur ein rundan dag á liðnum. Spældi við myndugleika, tá hann kom inn, og tað er eyðsæð ein missur fyri liðið, at metmaðurin ikki fær verið við í Íslandi.

**14. Pól Thorsteinsson, B36, 27/0**
Mátti eins og Óli byrja dystin uttanfyri, men saman skaptu teir báðir eina trygga miðverju eftir steðgin. Tað hoyrir tó við, at trýstið nú var væl minni á verjuni, enn tað var fyri steðgin, men alt í alt er einki at ivast í, at Pól eisini er millum teirra, sum hoyrir heima á liðnum.

**15. Jann Ingi Petersen, B68 2/0**
Stóra ljóspunktið frá fyrra dystinum fekk bert eitt gott korter á vøllinum hesaferð. Avrikið kann tí illa eftirmetast, men tað var hugvekjandi at síggja, hvussu væl hann dugdi at taka sjálvsálitið úr fyrra dystinum við sær, soleiðis at hann mest sum alt fyri eitt fekk sett sítt merki á dystin.

**17. Ingi Højsted, Arsenal, 1/0**
Yngsti føroyski landsliðsleikarin nakran tíð kom á vøllin seinastu trý korterini. Serliga fyrstu løtuna tóktist hann tyngdur av nervum, men sum frá leið batnaði hetta heilt nógv. Royndi at sýna umhugsni í avspælinum við bóltinum, og ikki minst var tað stuttligt at síggja ein framtíðar miðvøll, tá hann og Jann Ingi við bert 36 árum tilsamans spældu seinasta korterið saman.

# Ikki so galið



*Feløgini hava jú eisini fyrireikað seg væl og virðliga til kappingina, og tí er kropsliga venjingarstøðan nú um at vera tann rætta, helt Henrik Larsen, nú hann hevur havt liðið saman í fýra dagar*

**At leikararnir vóru tungir var ikki løgið eftir mongu venjingarnar hesar dagarnar, helt Henrik Larsen eftir seinna dystin móti Kasakhstan**

VENJARIN
*Jákup Mørk*

Hóast mong vóru samd um, at talan var um eitt heldur misjavnt avrik hjá føroyska landsliðnum, so tóktist landsliðsvenjarin, Henrik Larsen, tó at vera væl nøgdur um avrikið hjá liðnum. Ikki bara í hesum dystinum, men sæð yvir ein kamb hesar báðar seinastu dagarnar.

- Eg skal gjarna geva viðhald í, at fyrstu 20 minuttirnir ikki vóru av teimum bestu í dag, men annars haldi eg, at vit komu bara heilt væl frá dystinum. Fyrstu løtuna tykjast vit ógvuliga tungir, og uppspælið koyrir als ikki, sum tað skal, men hetta er kanska ikki annað enn náttúrligt. Vit hava vant nógv hesar dagarnar, og við tveimum dystum innan tríggjar dagar er ikki løgið, at summir av leikarum vóru eitt sindur seigligir í dag.

## Eru væl fyri

At liðið hóast hetta vísti seg at hava fysisku orkuna til at reisa seg, og at vera stinnari parturin yvir 90 minuttir, var tó nakað, sum venjarin fegnaðist um. Og hann helt sjálvur, at bæði kropsliga og leikliga var liðið nú heilt væl áleiðis. Ikki minst tí vit framvegis eru rættiliga tíðliga á árinum.

- Venjingarstøðan er í øllum førum nakað væl betri, enn hon var í Spania. Feløgini hava jú eisini fyrireikað seg væl og virðliga til kappingina, og tí er kropsliga venjingarstøðan nú um at vera tann rætta. Og leikliga eru vit heilt væl áleiðis. Enn kann nógv betrast, men tað er um at vera har.

## Einki avgjørt

Verður hugt at byrjunaruppstillingini hjá føroyska liðnum, so kundi hon í mangar mátar bent á, hvussu Henrik Larsen ætlar at seta liðið saman, tá dysturin móti Íslandi er á skránni. Heilt afturvísa hesum, vildi Henrik Larsen ikki, men hinvegin legði hann dent á, at tað so ikki er nakað, sum hann hevur lagt seg fastan á enn.

- Tað kann væl vera, at tað verða hasir ellivu, sum byrja inni tá, men tað er framvegis long tíð til tann dystin. Skaðar og aðrar forðingar kunnu koma fyri hjá summum, meðan aðrir kanska blóma upp, so tað fái eg á ongan hátt sagt enn.

- Tað er tó klárt, at hesir dystirnir hava hjálpt til í fyrireikingunum, soleiðis at eg nú kann gera mær nakrar tankar um, hvussu liðið skal setast saman. Eitt nú var tað gleðiligt at síggja, at Julian væl kann nýtast í høgra borði, soleiðis at vit nú hava eitt alternativ í tí plássinum.

Hvussu er og ikki, so var hetta í øllum førum seinasta altjóða fyrireikingin undan komandi undankappingardystunum, og tá vit at enda spurdu Henrik Larsen, um hann er til reiðar til teir dystirnar, segði hann, at sjálvandi er hann tað.

- Vit skulu jú altíð vera klárir, men sum sagt, so kunnu vit ikki gera nakað endaligt her og nú. Vit mugu taka tingini, í teirri raðfylgju, sum tey koma, og so mugu vit gera okkara besta, tá avbjóðingarnar standa fyri framman, helt venjarin at enda.


